

*Marita Petersen um oljuspurningin:*

# -Vit mugu draga eina og somu línu

*-Talan er ikki um smáttaríir, men um at leggja eina ætlan fyri, hvussu okkara framtíð skal síggja út. Tí vóni eg, at allir flokkar fara at semjast um at draga eina og somu línu í hesum stóra máli.*

Hetta segði Marita Petersen, løgmaður, tá hon mikukvøldið endaði orðaskiftið á tingið um oljuspurningin. Løgmaður var væl nøgd við orðaskiftið, nú flest allir flokkar eisini tóku undir við uppskoti landsstýrisins.

Hon helt tað vera sera umráðandi, at tær avgerðir, sum verða tiknar nú, fáa eina so breiða undirtøku, at tær ikki bráddliga verða broytta, tá eitt nýtt landsstýrið tekur við. Hetta var eisini tað, sum fleiri av andstøðutingmonnunum løgdu dent á, m.a. umboð fólkafloksins.

Løgmaður segði eisini, at hon fegin vildi brúka meiri tíð til at tosa við andstøðuna um oljuspurningarnar í framtíðini. Marita Petersen dámdi hugskotið hjá Tordi Niclasen um at skipa fyri einum skeiði í oljuspurningum fyri politikarum og teimum serkønu og segði, at landsstýrið vil taka eitt slíkt stig.

-Tað er eingin í Føroyum, sum ivast í, at vit hava brúk fyri at finna aðrar møguleikar fyri at kunna lívbjarga okkum í hesum landi segði Marita Petersen, tá hon loksins endaði orðaskiftið um forkanningar í sambandi við møguliga oljuvinnu.

jan

# Sjálvhjálparbólkar

Aftur í heyst skipar Kvinnuhúsið fyri sjálvhjálparbólkum. Ein sjálvhjálparbólkur er ein bólkur, í hesum føri av kvinnum, ið hava líknandi trupulleikar. Endamálið við bólkinum er, at kvinnurnar stuðla hvørji aðrari, finna loysnir og veita hjálp til sjálvhjálp.

Sjálvhjálparbólkarnir taka støði í umstøðunum hjá tí einstøku kvinnuni og arbeitt verður út frá hesum. Kvinnurnar avgera sjálvar hvussu arbeiðið fer fram í bólkinum og hvat serligur dentur skal leggjast á.

Sjálvhjálparbólkar hava ofta ein persón, ið ikki beinleiðis er luttakari í bólkinum, men sum virkar stýrandi og leggur bólkinum lag á arbeiðið ta fyrstu tíðina. Sum tíðin líður, og bólkurin gerst meira sjálvstøðugur, er ætlanin at tann leiðandi persónurin fær minni týdning fyri arbeiðið, og at enda fer úr bólkinum, soleiðis at bólkurin gerst sjálvstøðugur, og luttakararnir at enda sjálvir stýra arbeiðinum.

Kvinnurnar, sum fara at leiða sjálvhjálparbólkarnar, arbeiða allar sum sjálvbodnar í Kvinnuhúsinum og hava royndir við slíkum arbeiði. Vit fara at hava 10 fundir við leiðara og verður kostnaðurin 30 kr. fyri hvørja ferð.

Í heyst er so ætlanin at hava bólkar, sum arbeiða við evnunum samlívstrupulleikar, separatión og hjúnaskilnaður, og bólk fyri kvinnur, ið sum barn ella hálvvaksnar hava verið fyri kynsligum ágangi ella incest.

Leiðarar fyri bólkarnar verða Brynhild Danielsen, Ása Ellefsen, Anna Debes Hentze og Jane Hoydal.

**Kvinnuhúsfelagið**


## VINNIÐ
### SKOTLANDSFERÐ

**fyri 2 vaksin v bili og børnum undir 14 ár**

við uppihaldi eina heila viku tilsamans á Douglas Hotel, Aberdeen, Crieff Hydro, Crieff og Arms Hotel, Braemar

**Aðrir vinningar**

2 snarferðir til Aberdeen fyri 2 vaksin

Tiltiknu skotsku turriklæðini / 10 vinningar

Sweat shirts / 4 vinningar

**Kappingin 15 SPURNINGAR UM SKOTLAND**

Fyrsti spurningurin, sum svarast skal, er aðrastaðni í blaðnum Í DAG, leygardagin 11. sept. – síðan í hvørjum fylgjandi blaði.

Greinin á síðu 16 & 17 í hósdagsblaðnum 9. sept. hjálpir tykkum at svara spurningunum – so goymið hana

Drigið verður so vinnararnir kunnu nýta ferðirnar í heystfrítíðini

*Sjalvandi verður siglt við SMYRLI!*



## Sjúkrakassalimir í Vestmanna Læknadømi

Skrivstovan í Kollafirði verður stongd vegna sjúku frá 15. sept. 93. Kunngjørt verður, tá opið verður aftur.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**



## Nissan Sunny Micra

frá mai 88, til sølu fyri kr. 30.000,- kontant.

**Tlf. 13224**



## Opel Ascona 2,0 i

frá 87, v/ sóltaki, breiðum felgum á lágprofildekkum, hita í setrunum, tónaðum rútum, er nýlakkeraður og nýsýnaður, bíliga til sølu.

**Tlf. 18871**



## Ynskist

Hús ella stór íbúð ynskist til leigu. Max. kr. 3.500 v/ ljósi og hita um mðr.

**Bill. mrk. 145, at senda blaðnum**